# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá góði pápi okkara

**Bjarni Øster**
Tórshavn

doyði og varð jarðaður.

Takk fyri alla hjálp og takk til tykkum, sum vóru við til bønarhaldið í Esbjerg og til jarðarferðina úr Havnar kirkju.
Takk fyri blómur og kransar og til tykkum sum lótu gávu til Frelsunarherin í Esbjerg.

*Familjunnar vegna*

**Anja Kristina og Guðrun**

## Tøkk

Hjartans tøkk til tykkum øll, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu, tá elskaði maður, pápi, verfaðir og abbi okkara

**Frits Witt**
Miðvágur

doyði og varð jarðaður.

Hjartans tøkk til tykkum, sum hjálptu til við jarðarferðini og ervinum.
Tøkk fyri blómur, kransar, gávur og til tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*

**Anna Maria, Margrethe og Liljan**

## Tøkk

Hjartans tøkk til tykkum øll, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu, tá kæra kona, mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Ruth Rasmussen**
Søldafjørður

doyði og varð jarðað.

Tøkk til tykkum, sum hjálptu til við jarðarferðini og ervinum, og til tykkum, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað her.
Somuleiðis verður takka fyri gávurnar til Zarepta.
Eisini ein tøkk til tykkum á B6 og G4 fyri ta umsorgan tit gávu henni.

*Familjunnar vegna*

**Klæmint, Ian, Per, Gusta, Pól og Árni**

# Edvin Danielsen 80 ár

Fríggjadagin 2. desember fyllir Edvin Danielsen í Klaksvík 80 ár. Føðingardagurin verður hildin á Klaksvíkar Sjómansheimi leygardagin 3. desember, frá klokkan í. 16.00 – 19.00.

Edvin er ættaður úr Kollafirði, sonur Lisu Joensen og Sámal Jóhannes Danielsen, vanliga róptur Sammajóannes.

Í 1951 giftist hann við Lenu Danielsen úr Fuglafirði. Tey búsettu seg á Selheyggi í Klaksvík, har Edvin, saman við Essa Johannesen, læt byggja eini tvíhús.

Lena og Edvin fingu børnini, Lis, Elsebeth og Ejler.

Lis er gift Birgiri Poulsen, og eiga tey børnini, Elsebeth, Ednu og Virgar.

Ejler giftist Eyðbritt Hansen. Tey fingu døturnar Karolinu og Lenu.

Edvin eigur eina langabbadóttir; hon eitur Birna.

Fyri nøkrum árum síðani fór Lena heim til Harran, og Edvin býr nú í Sambýlinum í Bøgøtu í Klaksvík.

Tað, sum eyðkennir Edvin, er hansara blídliga og milda lyndi. Hann er eitt friðarfólk, ið ongantíð hevur rópt upp um nakað, men sum stillisliga hevur passað seg og sítt.

Edvin er altíð við tí góða orðinum, og tú hoyrir hann ongantíð tosa ilt um nakran.

Heimið hjá teimum á Selheyggi var eitt fyrimyndarligt heim, har kærleiki, nøgdsemi og gudsótti vóru sjónlig.

Tað fyrsta, tú legði merki til, tá tú komst á gátt, var tann vælsignaði friður, sum valdaði í teirra heimi.

Serstakliga gestablíð vóru tey bæði eisini, og tú kendi veruliga, hvussu glað tey vóru, tá fólk stukku inn á gólvið.

Sum ungur kom Edvin til trúgv á Harran, og tað hevur sermerkt alt hansara lív. Á yngri døgum ferðaðist hann nógv millum oyggjarnar við bátinum Sendiboðið at halda møtir.

Edvin er av arbeiðssamastu monnum. Tey seinastu mongu árini, áðrenn hann fór frá fyri aldur, koyrdi hann havnakranan.

Hann var eisini við í arbeiðnum at gera Oyggjarvegin og at gera tunlarnar úr Klaksvík til Árnafjarðar og Norðdepil.

Edvin var nummar 7 av einum systkinaflokki uppá 21, av hesum 9 samsystkin.

Sámal Jóhannes (Sammajóannes) var giftur 3 ferðir:

Fyrsta konan var Jacobina Joensen úr Havn.
Tey fingu 2 børn: Betty (1906) og Octavia (1908)

Onnur konan var Lisa Joensen úr Skopun.
Tey fingu 9 børn: Bina (1919), Jóhannes (1921), Jona (1922), Kristian (vanliga nevndur Kis) (1924), Edvin (1925), Olaf (1927), Helena (1928), Petur (1930) og Leivur (1932)

Triðja konan var Maren Susanna Jacobsen úr Kollafirði, vanliga nevnd Sanna.
Tey fingu 10 børn: Jens Vilhelm (1941), Anker (1942), Marnhild (1942), Sonry (1943), Diana (1945), Victoria (1946), Henrikka (1946), Levi (1947), Maiken (1949) og Lisa (1951)



Tað ber ikki til at skriva um Edvin uttan at nevna, at sorgina kennir hann sum fáur.

Bert níggju ára gamal misti hann mammu sína, og í 1965 doyði næstelsta dóttirin eftir stutta sjúkralegu, bert seks ára gomul. Í 1993 doyði sonurin brádliga, bert 27 ára gamal, og longu í 1998 bankaði sorgin aftur upp á hjá Edvini, tá kona hansara - eisini eftir stutta sjúkralegu – doyði, 71 ára gomul.

Men hóast sorgin hevur rakt Edvin so meint, so kann hann enn skemtast og gleðast um lívið.

Hann eigur ta vón, at hetta lívið er ikki alt. Hann kann gleðast í vissuni um, at hann skjótt skal síggja øll tey kæru aftur, sum undan honum fóru.

Góði Edvin! Eitt blítt lívskvøld ynskja vit tær, og hjartaliga tillukku á runda degnum. Harrin signi teg og tíni kæru.

*Men tá ið ljósið dvølur fjøllum á,*
*Og løtur stillar líða,*
*Ein ósædd hond mær stundum opnar tá*
*Tær dyr til landið fríða.*

*Og sum á gloppi standa hinar dyr,*
*Og dýrdin útum lýsir,*
*Gerst vissa sæl tað, veika hjarta spyr,*
*Hvør ivi, sinnið hýsir.*

**rs**

Sosialurin
Lesið Sosialin - so eru tit við